## Símun tapti og varð skiftur

Keflavík spældi í gjárkvøldið í íslendsku landskappingini, og dysturin endaði við tapi fyri IA av Akranesi, sum hevur ligið illa fyri á stigatalvuni alt kappingarárið. IA skoraði einasta málið, sum kom í dystinum, og tað gjørdu teir eftir ein slakan hálvan tíma. Sigurin hjá IA hevði við sær, at teir nú eru triðniðast í deildini, meðan Keflavík misti næstfremsta plássið til KR, har Rógvi Jacobsen spældi við fyrr í ár. Símun Samuelsen byrjaði inni hjá Keflavík, men hann varð skiftur út í hálvleikssteðginum.



## Todi ikki við til UEFA Cup dyst

Start kom í gjárkvøldið víðari í UEFA Cup kappingini, eftir at liðið spældi ein spennandi dyst ímóti írska liðnum Dogheda. Dysturin endaði við brotsspørkum, og hesa kapping vann Start. Todi Jónsson var ikki við í norska hópinum, tí hann hevur fingið ein minni skaða.

– Eg fekk eitt spark undir dystinum ímóti Lillestrøm, og tað gongur í øllum førum ein vika, áðrenn eg fái spælt aftur, sigur Todi.

# B36 skal halda fast

**B36 hevur hvørki leikbann ella skaðar at dragast við sunnudagin, og hjá VB/Sumba er Jón Krosslá Poulsen einasti leikarin, ið ikki fer norður um suðuroyarfjørð**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tey eru tvey lið við tveimum góðum úrslitum í skjáttuni teir báðar seinastu dystirnar, ið hittast í Gundadali sunnudagin. Fyri viku síðani eydnaðist tað meistarunum at koppa oddaliðnum, EB/Streymi, og mikukvøldið vunnu teir á NSÍ.

Teir báðir dystirnir vórðu spældir í Gundadali, og báðir endaðu teir við einum 2-1 sigri til B36.

VB/Sumba skifti venjaran herfyri, og fyrsti dysturin hjá nýggja venjaraparinum, Bjarna Johansen og Finn Johannesen, var ein javnleikur móti GÍ í Vági. Næsta uppgávan hjá nýggju venjarunum var í Klaksvík, og har eydnaðist tað at stjala øll trý stigini.

### Allir mans tøkir

Hjá B36 stendur so væl til sum sjáldan áður i hópinum. Ikki ein skaða ella eitt leikbann merkir liðið, og verður spennandi at síggja hvørt tað verður sama lið, ið byrjar móti VB/Sumba sum í móti NSÍ, ella um Sigfríður Clementsen ger onkrar broytingar á liðnum.

Eisini í Suðuroy stendur væl til manningarliga. Einasti leikarin, ið hevur givið avboð er Jón Krosslá Poulsen.

Í Vági er lagið annars gott fyri tíðina, hóast tey langt frá kenna tilveruna í deildini tryggjaða. Vónirnar at fáa eitt hampiligt úrslit í Gundadali sunnudagin, eru avgjørt til staðar, og minnast tey aftur á seinastu vitjanina í Gundadali, tá teir leiktu javnt í móti B36.

Hetta er eitt úrslit vanligi B36'arin heldur enn gjarna vil vaska av sær, og tí er onki annað enn ein sigur nøktandi hjá teimum sunnudagin.



*Bergur Midjord og restin av B36-manningini skal halda fast um góðu gongdina, og tað gera teir bara við einum sigri á VB/Sumba*

## U19 landslið í flogbólti tikin út

**U19 landsliðini hjá monnum og kvinnum í flogbólti eru tikin út. Liðini skulu taka lut í Nevaz Cup í Ikast síðst í hesum mánaðinum**

Kappingin verður roknað sum NM og verður hildin frá 31. august til 3. september. Landsliðsvenjararnir hava tikið hesi lið út:

**U19 hjá monnum:**
Heini Holm Andersen, Nøvan
Hallur Johannesen, Nøvan
Jan Jacobsen, Nøvan
Hanni Niclasen, Mjølnir
Gunnar Jørgensen, Mjølnir
Leif á Stongunum, Mjølnir
Thorvald Danielsen, Mjølnir
Jón Syderbø, Mjølnir
Janus Ortind, SÍ
Ingi Ole-Jacobsen, SÍ
Kim Christiansen, SÍ
Magnus Remberg, Fleyr

**U19 hjá kvinnum:**
Birgir Guttesen, SÍ
Unn Petursdóttir, SÍ
Elsa Nielsen, Dráttur
Eva Black, Mjølnir
Maria Steinkross, SÍ
Eina Kalsø, Mjølnir
Sólva Dimon, TB
Ruth Thomassen, Dráttur
Óluva Mohr, Fleyr
Kate Kalsø, Mjølnir
Annika á Stongum, SÍ

# Vagnur út og Jákup inn

**Ein lyklaleikari fer út við leikbanni, og ein annar kemur aftur eftir at hava verið leikbannaður seinast. Tað er støðan hjá HB undan dystinum móti Skála, sum framvegis má vera Bjarna Jørgensen fyri uttan**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

HB liggur á øðrum plássi, og eftir at B36 spældi útsetta dystin móti NSÍ mikukvøldið, eru tey bæði høvuðsstaðarliðini jøvn í stigum. Teir hava 36 stig og NSÍ hevur 35 stig, so kappingin í oddinum er gróthørð. Ein sigur er eitt krav, líkamikið um HB ætlar at varðveita næstfremsta sæti í deildini, ella um teir ætla at fáa oddaliðið aftur.

Vanta hvør sín mann

Bæði liðini, sum fara á vøllin sunnudagin mugu vera hvør sín lyklaleikara fyri uttan.

Í dystinum móti NSÍ seinast fekk Vagnur Mohr Mortensen tvey gul kort og noyddist av vøllinum. Hann verður tí ikki við í dystinum móti Skála sunnudagin.

Hinvegin verður ein annar lyklaleikari hjá HB við aftur, eftir at hann hevur sitið ein dyst yvir. Tað er Jákup á Borg, og hann er sera væl fyri fyri tíðina.

HB-venjarin hevur flutt nógv runt við fólkinum í ár, og teir eru fáir, ið hava kent seg tryggar á sínum plássi á liðnum. Ein av teimum fáu, ið hevur verið rímiliga tryggur á sínum plássi, er netupp Vagnur M. Mortensen, sum nú er úti og tískil skal ein maður finnast til miðverjuplássið.

Her tykjast mest uppløgdu boðini at vera annaðhvørt Svend Jacobsen ella Poul Thomas Dam.

Hjá Skála hevur Bjarni Jørgensen spælt millum lítið og onki í ár, og hann er framvegis ikki tøkur. Í vikuni var hann hjá einum serfrøðingi, ið kundi staðfesta, at Bjarni Jørgensen hevur betendilsi í lærkrikanum. Hann skuldi síðani binda frið í eina tíð, men venur nú aftur spakuliga.

Annars eru allir mans tøkir, og hóast Skála ikki hevur nógv at spæla fyri sum so, siga teir, at teir altíð spæla fyri at vinna. Eisini sunnudagin móti HB í Gundadali.

Og júst heimavøllurin í Gundadali ger, at HB ikki kann loyva sær annað enn at fara eftir øllum trimum stigunum. Úr HB siga teir, at teir hava nógva virðing fyri Skála hóast teir ikki hava havt eitt so væleydnað kappingarár, men at teir fara eftir øllum trimum stigunum sunnudagin.